# MIÐBÝARÆTLAN FYRI FUGLAFJØRÐ

HUGSKOTSKAPPING, UPPSKOT 30684

24. MAI 2024



# INNIHALDSYVIRLIT


**LÝSING AV VERANDI STØÐU**

4 VISJÓN
5 STUTT UM FUGLAFJØRÐ
7 ØKIR VIÐ MENNINGARMØGULEIKUM
8 GJØGNUMGONGD AV VERANDI BYGNINGUM
10 12 BÝARLÍVSMETINGARPUNKT
10 TEY 17 HEIMSMÁLINI HJÁ ST
10 BÝARMENNINGAR-DOUGHNUT

**UPPSKOT**

14 INNGANGUR
15 KONSEPT
16 HØVUÐSÁTAKSØKI
18 FUNKTIÓNIR AV BYGNINGUM
19 SJÓVARMÁLI, STØÐDARLUTFALL OG LANDSLAG
21 STRANDARGØTAN
22 BLÁI GEIRIN - FISKATORGIÐ
24 GRØNI GEIRIN
24 LARSENSTORGIÐ
26 GAMLA FISKASTYKKIÐ
27 HØVUÐSVEGURIN
29 HAVSVIMJING OG KYRJASTEINUR
30 VÍKINGATOFTIR - OYRAN
31 BÓKASAVN
31 BRÚGV
32 ARKITEKTURUR
33 VIÐKOMANDI FASADUR
34 MÁLBÓLKAR OG BÚSTAÐARSLØG
38 FERÐSLURENSL
39 BURÐARDYGD
39 12 BÝARLÍVSMETINGARPUNKT








# LÝSING AV VERANDI STØÐU





# VISJÓN

Fuglafjørður sigst mest sannlíkt at hava fingið navnið av tí nógva fuglinum sum her var tá fyrstu fólkini komu til staðið og hildu tit. Fuglurin er eisini ímynd av frælsari veru sum sjálv gera av hvar hon ferðast, fer á flog, reikar og setir seg har best og mest høgligt er. Í búmerkinum hjá kommununi er fuglurin eisini í hásæti. Fuglurin umboðar harafturat eisini ta livandi náttúruna. Merkið hevur eisini sjógvin og fjøllini sum tað meiri staðbundna og stationera í Fuglafirði.

Visjónin í uppskotinum er at geva íbúgvum, borgaranum og vitjandi náttúruna og serliga sjóvarmálan aftur.
Júst so sum tað hevur verið í nógvar øldir í Fuglafirði. Í nýggjari tíð, seinastu uml. 100 árini, eru vit menniskju førkaði niðanfrá sjóvarmálanum. Og serliga seinastu 50 árini eru vit nærum fremmandir gestir við sjóvarmálan. Við heildarætlanini vilja vit at betra munandi um fyritreytirnar hjá menniskju at trívast og mennast í Fuglafirði.






Søguliga kortið vísur staðsetingina av Fuglafirði djúpt inni á fjørðinum við høgum fjøllum runt um. Legg til merkis staðsetingina av húsum nærhendis sjógvi ella áum.

# STUTT UM FUGLAFJØRÐ

Fuglafjørður hevur sera stórt potensiali at vera ein býur við serligum dygdum. Náttúran hevur skapað fjøllini kring fjørðin soleiðis, at fýsiska høvuðsskapið kann sammetast við stórt amfiteatur. Fjallasíðurnar gera tað lagaligt at síggja oman í miðbýin nærum frá hvørjum húsi í býnum. Tað er klárt, at um býurin einans veksur niðan brekkurnar og møguliga vestur í Innandals, verður har øðrvísi. Tí er neyðugt at skipa og fremja menning og vøkstur niðri í býnum. Neyðugt er eisini at hugsa um menniskja fyrst og síðan hvat er best fyri aðrar týdningarmiklar tættir í eini kommunu og býi. Frítíðarvirksemi, ferðslu, vinnulív, handilslív o.a.

Fuglafjørður hevur ígjøgnum sera nógv ár, fostrað og átt ríka mentan. Mentan av alskyns slag, sum bæði hevur verið lokal, bæði so og so; men eisini global og er floymd út um allar Føroyar og longri út.

Tí er tað av stórum týdningi, at kommunan setir sær fyri at hava góðan amboðskassa til at kunna stýra millum allar avbjóðingar. Tá tað rekur við, í góðum tíðum og serliga tá tað rekur ímóti, tá verri tíðir eru. Ongin ivi kann vera um, at Fuglafjørður enn ikki hevur sæð alt sum býurin kann menna seg til. Hóast nógv er gott í dag, kann takast samanum við at siga, at tað besta er eftir enn.



Eldri mynd av Fuglafirði, har sjóvarmálin er týðiligur og húsini eru staðsett við týðiligum sambandi til sjógvin.





**VERANDI SJÓVARMÁLI**
Tað mesta av sjóvarmálanum er útbygt. Útbygdi sjóvarmálin hevur grótkast við varierandi hæddum fyri at verja eitt nú smábátarnar. Eitt nú stendur Mentanarhúsið og tungi ídnaðurin á útbygdum lendi. Lítið er eftir av upprunaliga sjóvarmálanum. Upprunaligi sjóvarmálin sæst við sandin, oyruna og partvís inni í smábátahylinum.




**FRÁSTØÐUR**
Frástøðurnar í Fuglafirði eru lutfalsliga stuttar - bert 700 metrar er frá einum enda í annan av kappingarøkinum. Tó kann rímiliga bratta lendi verða ein avbjóðing fyri at skapa góðar fortreytir fyri gangandi, súkklandi og tey við rørslutarni.



**VEÐUR**
Sólargangurin í Fuglafirði er góður, serliga summarmánaðirnar. Trupult er at skilja neyvt, hvussu hart vindur rakar í Fuglafirði, tí fjøllini eru við til at stýra vindinum. Munur er eisini á um tað bert er eitt sindur av vindi ella um vindur er av stormstyrki. Sum heild er føroyska veðrið harðbalið og neyðugt er at sniðgeva við hesum í huga.



**HØVUÐSVEGIR**
Høvuðsvegurin niðarlaga í býnum er merktur av tungu ferðsluni. Eisini hevur vegurin eitt serligt eyðkenni við flisaáløgdum gongubreytum. Hinir markaðu vegirnir á diagramminum omanfyri hava ikki somu tungu ferðsluna, men hava partvís sama úttrykk við breiðum vegum og partvís gongubreytum.



**MINNI VEGIR OG GØTUR**
Nógvir minni vegir eru í økinum, harav fleiri eru blindir. Hesir vegir halda ofta fram sum lendisgøtur. Aðrir lendisgøtur eru í økinum, sum bert partvíst eru bundnar saman til longri samanhangandi gøtur.



**PARKERINGSPLÁSS**
Tað er eitt rímiligt tal av parkeringsplássum í Fuglafirði. Umráðandi er at parkeringspláss ikki fylla alt ov nógv í landslagnum, so bilaferðslan ikki fær ov nógvan ans.

# ØKIR VIÐ MENNINGARMØGULEIKUM




Øll nevndu og eyðmerktu økir hava møguleikar fyri at vera ment til stór og gevandi aktiv í býnum. Støðini liggja spjødd runt í býnum og tað ávirkar sjálvsagt nakað, hvussu stóran týdning tey hava og hvussu nógv tey vera vitjað og brúkt. Tað má sigast at vera gott at tey eru spjadd, tí so er orsøk at leggja sær leiðina til støðini; tey gerðast endamál við túrinum. Helst mest fyri vitjandi; men týdningurin av at tey ið búgva í Fuglafirði eisini hava støð við áhuga runt í býnum, skal ikki undirmetast.

Aðrastaðni í hesum tilfari vera økini við menningar-møguleikum lýst í tekningum, myndum og teksti.

Annar fyrimunur við at hava ymisk støð at menna, er at so liggur eitt ávíst stað í býnum ikki sum innigyrðt byggipláss og forðar almenna atkomu í longri tíð. Tó verður minnt á, at menningarøkini niðri við sjóvarmálan hava hægst raðfesting.














# GJØGNUMGONGD AV VERANDI BYGNINGUM




## BYGNINGAR, IÐ SKULU VARÐVEITAST



**1 - VESTURSTOVA -** Vesturstova er nú útbygt og fyllir meiri enn upprunaliga. Parkeringsmongd kann verða avbjóðandi og skal leggjast í komandi ætlanir. Framsíðurnar, serliga oman móti býnum skulu gerast við hepnari hond.



**2 - ÍF HÚSIÐ -** Nýtt hús sum tekur seg væl út á síðum móti vølli og móti býnum. Heldur løgið frágingið niðan móti beni.



**3 - BARNALUND -** Barnagarður við stórum útiøki móti vestri og góðum sólargangi. Liggur væl fyri miðskeiðis í býnum, tætt við fótbóltsvøllin og skúla.



**4 - FUGLAFJARÐAR SKÚLI -** Skúlin er størsta bygningseind í miðbýnum. Og verður helst tillagaður og útbygdur meiri í komandi áratíggjum. Hetta kann gerast avbjóðandi. Tornið er hugfarsligt motiv og vísir til eldri bygning.



**5 - THABOR -** Missiónshúsið Thabor bleiv útbygt fyri nógvum árum síðani. Sjálvt um tað ikki er neiligt fyri økið, sum so, er asfaltflatan, serliga eystanfyri ikki tiltalandi.



**6 - FUGLAFJARÐAR KIRKJA -** Kirkjan er tignarlig, stórlig og sjónlig. Bygningurin hevur heilt stóran týdning fyri bygdalagið. Er sum ein varði á at lýta. Økið og flatan uttanum kann betrast og betur sameinast við aðrar tættir í býnum.



**7 - HJALLURIN OG HØVDAHÚSINI -** Hóast hesin lítli bygningur ikk er hjallur í orðsins rætta týdningi, er hann tiltalandi íkast til lundina, býin og økið.



**8 - SILOA -** Bygningurin er hóskandi stødd og staðseting í býarmyndini. Tó kunnu framsíðurnar gerast betur, serliga oman móti Mentanartorginum.



**9 - BÝRÁÐSHÚSIÐ -** Tignarligur bygningur sum er lutfalsliga gjøgnumskygdur móti vegi og gongubreyt. Stendur seg væl sum han er.



**10 - RIBARHÚS -** Verður varðveittur og lyftir upp tygnarliga. Serliga á niðaru hædd og sambandið við økið niðanfyri. Visuella og fýsiska sambandi við sjógvin og kajina verður styrkt munandi.



**11 - BAKKAVEGUR 4 - KATO -** Hesin eldri bygningur er broyttur nakað gjøgnum seinastu áratíggjuni. Hevur fingið nakrar staklutir sum eru heldur fremmandir í føroyskum bygdalagi.



**12 - MENTANARHÚSIÐ -** Mentanarhúsið hevur hóskandi funktión, stødd og staðseting. Framsíðurnar eru serligar og serliga ljósareyðu partarnir í betonginum, vekja ans og stinga út úr heild.

## BYGNINGAR, IÐ KUNNU BROYTA SNIÐ ELLA FUNKTIÓN



**13 - BRANDSTØÐIN -**
Brandstøðin stendur miðskeiðis í býnum. Bygningurin er serligur, men kundi verið gjørdur meira tiltalandi. Útiøkini kundu verið fríðkaði.



**14 - LONIN -** Bygningur sum nógv enn kalla Klubbin, eftir virkseminum sum var í fleiri áratíggju. Tiltalandi høli til ymiskt har fólk savnast, fundir, bingo, veitslur og framsýningar. Stendur nakað ábært.



**15 - SKÚRUR HJÁ KOMMUNUNI -** Eldri bygningur við praktiskum brúki, uppihald og goymsla hjá viðlíkahaldinum. Bygningur treingir til dagføringar og útiøkini eisini. Bygningur kundi verið tikin burtur um onnur hølir eru til viðlíkahald.



**16 - MORTANSHÚS -** Gomul hús, sum blivu sett í stand, bæði innan og uttan, fyri yvir 40 árum síðan. Áhugverdur bygningur; men verður ikki gagnnýttur nevnivert ídag, hvørki fyri borgarar ella ferðafólk.



**17 - KARVATOFTIR 2 - HARALDSEN -**
Hóskandi stórur bygningur, miðskeiðis í býnum. Liggur væl fyri til nógv ymiskt endamál og virksemi. Nú nakað afturlatin í framsíðu fyri at liggja so væl fyri.



**18 - GAMLA DANSISTOVAN -** Gamla dansistovan er broytt og tillagað gjøgnum seinastu mongu árini. Bygningurin er ikki nakað prýði og treingir til nýggjan búnað. Góða staðsetingin talar eisini fyri at t.d. ein hædd verður bygd omaná.



**19 - TURKIHÚSIÐ - JOHN'S -** Upprunaliga eldri bygningur sum liggur sera væl fyri og hevur stórt virði á fleiri økjum. Møguliga kann hædd verða bygd omaná.



**20 - BÓKASAVNIÐ Á BUG -** Gamli serstaki bygningurin móti vegnum stóran søguligan týdning og skal varðveitast. Nýggjaru partarnir niðaneftir kunnu betrast og tillagast í samband við nýggjan bygning fyri at vaksa um bóka-/miðlasavn.



**21 - Í STØÐ 6 OG 8 - VØRÐSLAN, NOÐASTOVA O.A. -**
Talan er um tveir bygningar harav annar eldri og hin rættiliga nýggjur. Eru bygdir saman men eru tó hvør sín, serliga móti vegnum. Bygningurin har Vørðslan er, hevur býarsøguligt virði sum skal tjúklast um.



**22 - TOFTAGØTA 1 - MUNTRA, FJORD O.A. -**
Stórur bygningur miðskeiðis í býnum. Hevur framvegis stórt potentiali fyri at hýsa nógvum ymiskum virksemi í framtíðini. Niðasta hædd kundi hýst meiri útvendum virksemi.



**23 - Í STØÐ 12 - ELLISAKFØR -** Hesin bygningurin, sum kann kallast goymsluhøll, verður ikki mettur at hava søguligan ella byggilistarligan týdning. Standurin á bygninginum talar eisini fyri at umfatandi tiltak. Bygningurin stendur á staði sum er rættiliga áhugavert og týdningarmikið.



**24 - BAKKAVEGUR 2 - BEDING, K.J. HYDRAULIK -**
Hesin sjarmerandi lítli bygningur sigur eina serliga søgu sum tjúklast skal um. Virksemið er enn bedingsvirksemið; men verður helst broytt/tillagað í komandi árum.



**25 - LÆKNAMIÐSTØÐ -** Stórur og eyðkendur bygningur tætt at miðbýnum, tó nakað burt frá høvuðsvegi. Fyrrverandi Keypsamtøka og nú læknamiðstøð.



**26 - SKÓTAHÚSINI -** Upprunaliga setús sum eru gjørd um til skótavirksemi við nakað av útiøki.



**27 - BAKKAVEGUR 6 - FK OG KAPPRÓÐRARNEYST -**
Lutfalsliga nýggjur stórur bygningur sum liggur við høvuðsvegin. Sum bygningur letur hann ikki nógv aftur til býin, er nakað kubbutur og afturlatin. Kundi verið gagnnýttur betur. Niðara hædd hýsur nú kappróðrarvirksemi.



**28 - BAKKAVEGUR 8 - PETUR LARSEN -** Hesin bygningurin er ikki gamal og harvið í toluligum standi; men virksemið er ikki heilt so hóskandi til staðsetingina og økið sum heild við atliti til menning av býnum.



**29 - BAKKAVEGUR 10 - EGNINGARSKÚRAR -** Lági bygninurin, bygdur einamest til egningarskúrar fyri nøkrum áratíggjum síðan. Virksemið við egning og útróðri við línu er so at siga heilt hildið uppat. Bygningurin er nú óvirkin.



**30 - ARBEIÐSMANNAFELAGSHÚSIÐ/CITY -** Lutfalsliga stórur bygningur, eldri bygningur sum hevur potentiali til at vera gagnnýttur betur. Krevur helst ábøtur, eins og bjálving o.a.



**31 - BAKKAVEGUR 20 -** Bygningurin liggur á markinum millum lættaru og tyngru vinnuna og hevur blandaða funktión. Kennist afturlatin, tó hann kundi blivið partur av meira býarkenda økinum, um bygningurin var gjørdur um ella bygdur av nýggjum.



**32 - GAMLA KOMMUNUSKRIVSTOVAN -** Lutfalsliga eldri bygningur, sum eftir ætlan skal gerast til íbúðir.

# 12 BÝARLÍVSMETINGARPUNKT

Viðurkendi danski arkitekturin Jan Gehl hevur gjøgnum sítt arbeiði funnið fram til 12 býarlívsmetingarpunkt, ið eru týðandi fyri at skapa ein góðan bý í eygnahædd. Fyrst og fremst er neyðugt at tryggja góða vernd fyri negativum árinum so sum ferðslu og ódámligum sansaligum upplivingum. Síðani skulu útirúmini eisini hava høga komfort og vera innbjóðandi til tað virksemi, ið menniskju brúka býin til. Til síðst er neyðugt at tryggja góðskuna á dýrdarvirðinum - hóskandi lutfall til menniskju og møguleiki at njóta veður og sansaligar upplivingar.

Niðanfyri er víst ein meting av verandi støðu í Fuglafirði. Sum heild er býurin ikki so innbjóðandi fyri menniskju og tað eru fáir møguleikar at uppihalda sær og uppliva býin. Tó eru ikki stórar avbjóðingar við kriminaliteti og rímiligir møguleikar at spæla og íðka.




# TEY 17 HEIMSMÁLINI HJÁ ST

Av teimum 17 heimsmálunum hjá ST, sum øll limalond í ST hava skyldu til at arbeiða eftir, eru vald 8, ið verða nýtt sum grundarlag undir hesum uppskotinum til miðbýarætlan fyri Fuglafjørð.

Heimsmálini eru innarbeidd í býarmenningar-doughuttinum sum eitt ítøkiligt amboð at røkka málunum.

Tey valdu heimsmálini eru:

| | |
|---|---|
| 3 | HEILSA OG TRIVNAÐUR |
| 8 | SÁMILIG ARBEIÐI OG BÚSKAPARLIGUR VØKSTUR |
| 9 | VINNA, NÝSKAPAN OG UNDIRSTØÐUKERVI |
| 11 | BURÐARDYGGIR BÝIR OG NÆRSAMFELAG |
| 12 | ÁBYRGDARFULT FORBRÚK OG FRAMLEIÐSLA |
| 13 | VEÐURLAGSÁTØK |
| 14 | LÍVIÐ Í HAVINUM |
| 15 | LÍVIÐ Á LANDI |



# BÝARMENNINGAR-DOUGHNUT

*Doughnut for Urban Development* – ella *Býarmenningardoughutturin* – byggir víðari uppá viðurkenda búskaparfrymilin *Doughnut Economics*, sum í størri mun leggur upp fyri veðurlagsbroytingum og burðardyggari menningargongd, enn klassiski vakstrarbúskapurin ger. Rundi frymilin saman við øllum teimum 17 heimsmálunum hjá ST er savnað til arbeiðsamboðið, sum er ein hondbók til ognar- og byggivinnuna til at menna burðardyggar bústaðar og býir sum heild. Amboðið tekur bæði við, hvussu bygging er innanfyri jarðarinnar tilfeingi, og hvussu byggingin kann vera við til at styrkja um sosiala grundarlagið og gera góðar býir. Málið er at nøkta tørvin hjá øllum menniskjum innanfyri mørkini hjá jørðini (planetary boundaries) og harvið halda seg inni í trygga og rættvísa økinum hjá menniskjum við javnbýttum og sjálvberandi sniðum. Ein meginregla í hondbókini er at gera "meira gott" heldur enn at gera "minni vánaligt".

Amboðið vísur á konkret átøk, ið kunnu gerast fyri vistfrøðiligu avmarkingina og sosiala grundarlagið – 48 átøk til hvørt høvuðsøki. Víst verður bæði á átøk, ið ávirka nærumhvørvið og átøk, ið eru heimsfevnandi.

Átøkini fevna m.a. um tilfarsval, varðveiting av lívfrøðiliga margfeldinum í nærumhvørvinum, staðseting av bygging, arbeiðsumstøður, liviumstøður, tá bygging er liðug, møguleikar at umvæla, at skapa sunnar felagsskapir vm. Hondbókin leggur upp til at velja út tey átøk, ið hóska til prosjektið og kontekstin, og sum byggir á mál og ynski hjá byggiharra og/ella ráðgeva.

Ein miðbýarætlan er ein yvirskipað ætlan við ynskjum (og krøvum) frá Fuglafjarðar Kommunu. Saman við visjónini hjá hesum uppskotinum, eru átøk vald út, ið ganga hond í hond við kappingarskrá og ynsktu raðfestingar.

Til seinni fasur, tá ymisk øki verða projekteraði og tikin í brúk, eigur átakslistin at vera eftirhugdur aftur fyri at tryggjað, at byggingin verður so burðardygg sum møguligt. Her hevur Fuglafjarðar Kommuna møguleika at seta krøv í byggisamtyktum og harvið syrgja fyri, at t.d. rætt tilfar verður nýtt, at fermetrarnir verða skilabest gagnýttir, at syrgt verður fyri atkomu fyri øll og at hølini verða haldfør og livitíðin er long.




**S13 - BÚSTAÐIR VIÐ RÍMILIGUM PRÍSI -** *Miðbýarætlanin skal hava blandaðir bústaðir, ið eru til at gjalda og atkomuligir fyri øll løg í samfelagnum, ið endurspeglar tørvin og keypiorkuna í økinum.*

**S14 - HÁGÓÐSKUBÚSTAÐIR -** *Øll ný- og umbygging í samband við miðbýarætlanina skal hava tilfar, ið er burðardygt, heilsugott og úr høgari góðsku.*

**S17 - SUNNIR FELAGSSKAPIR OG INKLUSJÓN -** *Miðbýarætlanin skal birta uppundir sunnar felagsskapir við at arbeiða við kommunalum tænastum og møguleikum at luttaka sosialt. Skapa eina kenslu av at hoyra til við atkomuligum felagsskapum*

**S18 - SOSIAL SAVNINGARMEGI -** *Miðbýarætlanin skal geva íbúgvum í Fuglafirði atgongd til sosialt undirstøðukervi, so sum skúlar, barnagarðar, ítróttarmøguleikar og aðrar felagsskapir í nánd av bústaði.*

**S21 - HEILSUGÓÐIR BYGNINGAR -** *Miðbýarætlanin skal arbeiða við ný- og umbygging av bygningum, ið birta uppundir kropsliga heilsu hjá íbúgvunum, t.d. gott inniklima og góð ljós- og ljóðviðurskifti*

**S22 - GÓÐ SÁLARHEILSA -** *Miðbýarætlanin skal arbeiða við ný- og umbygging av bygningum, ið birta uppundir kensluna av tryggleika, kensluna at hoyra til og virðing av privatlívi. Hetta kann gerast við strategiskari staðseting av vindeygum og opnum, hóvligum/natúrligum møguleikum at halda eyga við hvørjum øðrum, góðari ljósseting av útiøkjum og møguleikum fyri ymiskum virksemi á niðastu hæddunum.*

**S26 - LEGGJA UPP TIL BURÐARDYGGA ATFERÐ -** *Miðbýarætlanin skal arbeiða við at birta uppundir burðardygga atferð, t.d. endurnýtslu og at skilja rusk.*

**S34 - UNIVERSALT DESIGN -** *Miðbýarætlanin skal arbeiða við universellum designi og atkomumøguleikum við at taka burtur forðingar.*

**S46 - STUÐLA UNDIR VINNULÍV Á STAÐNUM -** *Miðbýarætlanin skal planleggja eftir metta tørvinum í Fuglafirði og gera høli, ið kunnu brúkast til ymiskar tørvir við tí ætlan at stuðla undir vinnulívinum á staðnum, t.d. høli til minni fyritøkur, hølir, har fleiri fyritøkur kunnu sita saman, hølir til kreativt og mentanarligt virksemi og almennar tænastur.*

**E03 - BURÐARDYGG SAMFERÐSLA -** *Miðbýarætlanin skal syrgja fyri at byggja á lendi, ið hongur saman við almennu samferðsluni fyri at birta uppundir burðardygga ferðing sum at ganga, súkkla, brúk av busssambondum og samkoyring.*

**E06 - MINST MØGULIG NÝBYGGING -** *Miðbýarætlanin skal syrgja fyri at gagnnýta verandi bygningar mest møguligt og byggja sum minst av nýggjum og harvið minka um útlát av CO2 og brúk av nýggjum tilfari.*

**E07 - FÁA MEST BURTURÚR FERMETRUM, TILFARI OG LIVITÍÐ -** *Miðbýarætlanin skal fáa sum mest burturúr øllum fermetrum við bert at byggja til metta tørvin (ikki ov stórt), gera fleksiblar loysnir, sniðgeva við so lágari tilfarsnýtslu sum møguligt og miða eftir langari livitíð.*

**E08 - FLEKSIBUL SNIÐGÁVA -** *Miðbýarætlanin skal arbeiða útfrá fleksiblari rúmnýtslu fyri at minka um tørvin á at byggja nýtt og fyri at gera tað møguligt at broyta virksemi yvir tíð - bæði yvir styttri tíðarskeið (dagar, vikur), t.d. við dupult programmering og "shared space" og longri tíðarskeið.*

**E09 - SNIÐGÁVA VIÐ DENTI Á RINGRÁSHUGSAN -** *Miðbýarætlanin skal vísa á sirkulerar loysnir til bygningar, ið viðvirkar til varðveiting av konstruktiónum og umhvørvisligum og estetiskum virðum. Vitan um tilfar og útrokning av væntaðari livitíð er partur av projekting (ikki partur av miðbýarætlan).*

**E12 - HALDFØR SNIÐGÁVA -** *Miðbýarætlanin skal vísa á haldbarar loysnir, ið eru léttar at viðlíkahalda og lætt at gera aftur fyri at skifta so lítið tilfar sum møguligt út. Veljast skulu loysnir, har støði av haldføri hóskar til brúkið.*

**E27 - INNBYGD ORKA -** *Miðbýarætlanin skal vísa á loysnir, har orkuframleiðsla kann gerast, so tað ikki nýtir annað lendi til hetta.*

**E28 - BYGG Á BRÚKT/BROYTT ØKIR -** *Miðbýarætlanin skal vísa á støð til býarmenning, ið longu eru í brúk/broytt.*

**E33 - VARÐVEITA LÍVFRØÐILIGA FJØLBROYTNI Í MOLDINI -** *Miðbýarætlanin skal arbeiða við at ný/umbygging skal liggja væl eftir lendinum, so minst møguligt at jørð skal flytast og serliga, at jørð ikki skal flytast inn á økið. Við at halda uppá moldina inni á økinum, og serliga um hon verður órørd, verður vistskipanin varðveitt.*

**E35 - REINSA LUFTINA -** *Miðbýarætlanin skal vísa á støð at gróðurseta trø og møguliga aðrar natúrbaseraðar loysnir, ið viðvirka til at reinsa luftina.*


SKALA
ÚTSÝNI
SJÓGVUR
VEGUR
STRANDAR-
GØTA

# UPPSKOT





Støðumynd av uppskoti 1:3000 (1:1000 á plansju)

# INNGANGUR

Fuglafjarðar Kommuna ynskir boð uppá hvussu býurin kann betrast og mennast. Nøkur átøksøkir eru nevnd við nøkrum nevndum viðurskiftum og/ella avbjóðingum. Sum vit tulka ynskini, skal uppskot og ella partar av uppskotunum, kunna fremjast í verki innanfyri eitt rímiliga stutt tíðarskeið.

Uppskotið tekur útgangsstøði í verandi viðurskiftum og gevur eitt ítøkiligt boð uppá avbjóðingar sum standa í útbjóðingartilfarinum. Eisini er dentur lagdur á, at uppskot og loysnir bera til at fremja. Bæði fýsiskt, fíggjarliga og mentanarliga.

Áirnar báðar, Gjógvará og Skarðsá, saman við grøna geiranum frá kirkjugarðinum, gjøgnum Miðstaðarlundina og oman í fjøruna, verða tiknar fram sum tey sermerktu og styrktu økini tvørturum landslagið. Upprunaligi sjóvarmáli og sambondini tvørturum verða eisini styrkt og nýtt sum farleið til bleyta ferðslu. Tilsamans verða hesar leiðir bundnar saman og serlig økir við menningarmøguleikum (points of interest) leggja seg aftrat leiðunum.

Seks høvuðsátaksøki eru:

1. Tunga og bleyta ferðslan verður sundurskild (tó við týdningarmiklum sambondum)
2. Fimm geirar við serligum eyðkennum fevna um størsta partin av økinum
3. Størru savningarøkini verða bundin saman
4. Fjølbroytt bygging verður gjørd á verandi lendi
5. Nýggi býarparturin skal verða burðardyggur
6. Bláa aktivi verður styrkt og skapar veðurlagstillagingar við meirvirði

Uppskotið leggur dent á at byggja, gagnnýta verandi viðurskifti í býnum mest møguligt og endurbyggja og byggja nýtt nærhendis sjóvarmálanum. Nærliggjandi hevði verið at mælt til at fylla nógv grót út á sjógv og bygt har. Møguliga er tað partvíst ein loysn um 50-100 ár, tá økið við upprunastrandarlinju er bygt.

Konseptið er robust og fleksibult, við tað at tað ikki eru júst detaljur og skap sum er avgerandi; men heldur grundleggjandi avgerðir um økir, nýtslur og átøk. Bygningar kunnu hava onnur skap, hæddir og partvíst aðrar funktiónir enn uppskotið uttan at heildin versnar.

Byggi- ella menningarstig kunnu vera ein bygningur her, annar har, sum liður í miðvísari broyting. Sama tilgongd kann nýtast við torgið, tilhaldsøki ella farleið. Eisini ber til at gera størri ætlanir, sum t.d. Larsenstorg har verður ment kann vera miðvíst í einum, tveimum ella trimum byggistigum.

# KONSEPT



+



=



**ÁHERÐSLA Á ÁIR OG GRØNAN GEIRA**
Arbeitt er við náttúrligum fyribrigdum í Fuglafirði. Tær báðar stóru og eyðkendu áirnar Gjógvará og Skarðsá og hvussu tær renna oman gjøgnum býin. Og hvussu tær kunnu vera við til at økja um býarrúm og tilhaldsøkir.

Ein grønur geiri hómast í dag miðskeiðis í bygdin, heilt frá ovasta vegi og oman gjøgnum býin. Hesin týdningarmikli geiri verður gjørdur týðiligari og meiri fullførdur. Harumframt verða fleiri átøk og tilhaldsøkir í grøna geiranum.

**UPPRUNALIGI SJÓVARMÁLIN**
Uppskotið arbeiðir við at styrkja ansin fyri uppruna strandarlinjuni og sjóvarmálanum. At skapa farleið framvið sjóvarmálanum.

Í sama viðfangi eisini at arbeiða við boðum og loysnum uppá hvussu sambandið frá verandi høvuðsvegi oman til sjóvarmálan, kann styrkjast og betrast.

**ØKIR VIÐ MENNINGARMØGULEIKUM FRAMVIÐ REKREATIVU LEIÐUNUM**
Við at hava ans fyri nógvu møguleikunum í býnum, er arbeitt við at skapa góð tilhaldsstøð og skapa nýggj átaksøkir og verkætlanir. Ymsu støðini skulu helst øll hava sítt sermerkta at bjóða. Samstundis er dentur lagdur á at hóskandi og tiltalandi samanbinding er millum mongu áhugaverdu støðini.

# HØVUÐSÁTAKSØKI








**SUNDURSKILJING AV FERÐSLU**
Ferðslan gjøgnum býin verður ikki flutt; men verður tálmað og tiltøk verða gjørd sum ger umstøðurnar hjá bleytum ferðandi munandi betri. Høvuðsvegurin vit kenna í dag fara at broyta útsjónd og tilfar, soleiðis at frá at vera ein vegur á siðbundan hátt, verður hann partur av miðbýarøki við tilfari sum er meiri torgkent. Økið hjá teimum gangandi verður munandi størri og tryggari.

Nýggja stóra og umfatandi átakið er at skapa eina nýggja tilhaldsleið niðri við sjóvarmálan, kallað Strandargøtan. Hetta økið kemur heilt at broyta hvussu fólk koma at nýta og fata býin við fjørðin. Tað er av alstórum týdningi at fólk og borgarar kunnu fáa góðar umstøður at uppliva og sansa náttúrugivnar umstøður og fyribrigdi. Við at ganga á verandi høvuðsgøtu, upplivir ein sera lítið av náttúruni. Tað er so at siga bert mannaskapt viðurskifti at síggja og merkja. Asfalt, bilar, vegir, handlar og bygningar.

**FIMM GEIRAR**
Annað gjøgnumgangandi átak er at skapa 5 geirar oman og niðan í býnum. Hesi knýta saman tey økini, ið mett eru at hava serliga góðar menningarmøguleikar. Hvør geiri hevur síni eyðkennir, ið verða fullførd og styrkt við konkretum átøkum.

Ljósari blái geirin hevur vatn, fiskivinnu og fiskavirking sum evni. Grøni geirin hevur vøkstur, trø, lundir og fordjúping sum evni – bæði ítøkiliga og andaliga. Guli geirin er hevur samkomu, mentan og tónleik sum evni. Myrkablái geirin hevur søgu, landnám, siðsøgu og byggisið sum evni. Harafturat er ein myrkagulur geiri ella økið, sum er nýggi býarparturin.

Niðast við í geirunum, í miðbýnum, verða allir geirarnir og «nýggju» økini knýtt saman við vegnum og serliga nýggja sambindingarliðinum Strandargøtuni.

**SAMANBINDING AV SAVNINGARØKJUM**
Framvið sjóvarmálanum verða 4 størri savningarøki skapað. Mentanartorgið og Oyran eru longu savningarstað til ávís tiltøk. Haraftrat verður torg við Ribarhús, Fiskatorgið, og torg í nýggja býarpartinum, Larsenstorg, skapað og bundin saman. Sambandið millum savningarstøðini er Strandargøtuni. Nýggi miðstaðurin í Fuglafirði verður Fiskatorgið har blái geirin og Skarðsá møtir Strandargøtuni.








**FJØLBROYTT BYGGING - EIN SAMANSETTUR BÝUR**

Fyri at ein býur skal vera fjálgur og tiltalandi hjá menniskjum at búgva og virka í, er av stórum týdningi, at hava fjølltáttaða bygging. Talan kann bæði vera smærri og størri bygningar, serstakar og einfaldar bygningar og um vanliga nýtslu og sjálvsama nýtslu og funktión. Harafturat er gott at eitt ymiskligt býarumhvørvi hevur torg, vegir, farleið uttan akfør og rekreativ grøn økir.

Bústaðarbygging og serliga nú íbúðarbygging vindir uppá seg, er neyðugt at tílík bygging er ymisk og fleirtáttað, bæði í vavi, útsjónd og góðskuútboði.

**EIN BURÐARDYGGUR BÝARPARTUR**

Tað mesta av nýbyggingini í miðbýarætlanini er nærhendis nýggja miðpunktinum og framvið upprunaligu strandarlinjuni. Tað er tí eisini her, at tað ber til at hava størst ávirkan á at skapa ein burðardyggan býarpart. Bygt verður bert á verandi lendi, sum so ella so longu er í brúk. Eisini er arbeitt við at fáa sum mest burturúr verandi bygningum. Bygt er eftir lendinum fyri at flyta so lítið av jørð sum møguligt. Nógv nýggj trø og annar vøkstur verður gróðursettur, bæði í nýggja býarpartinum og í øllum økinum.

Lagt er upp til at nýbyggingin er av høgari góðsku og heilsugóðir (bæði kropslig og sálarlig heilsa). Umráðandi er at byggja út frá tørvinum, ið er ella kann væntast. Sniðgávan er skal vera haldfør og fleksibul. Hvør eind skal ikki vera størri enn neyðugt og mest møguligt skal fáast burturúr hvørjum fermetri.

Við at øll nýbygging er nærhendis býarkjarnanum er lagt upp til burðardygga samferðslu, tí til ber at ganga, súkkla ella taka buss hjá øllum. Universelt design og atkoma fyri øll er eisini eitt aðalmál fyri hesa miðbýarætlanina.

**BLÁA AKTIVI OG VEÐURLAGSTILLAGINGAR VIÐ MEIRVIRÐI**

Kring heimin er tilvitskan um at kunna búgva og vera tætt við havnalag og sjógv, ment nógv. Í Føroyum hava vit helst tikið hetta fyri givið, ella hava gloymt hetta virðið eftirsum ysnki um stórt grundstykki at byggja á, hevur vundið uppá seg. Uppskotið leggur seg eftir at gera vart við gylta møguleikan í Fuglafirði og týdningin av at hesum bláa aktivi og tilfeingi. Í uppskotinum eru ymisk átøk og verkætlanir harav flestu teirra hava boð uppá hvussu bláa aktivið kann ríka býin.

Niðri við sjóvarmálan er eisini neyðugt at hava ávirkan av veðurlagsbroytingum við. Vatnstøðan er staðfest hækkað seinastu áratýggjuni og fer væntandi at hækka enn meir. Tí er neyðugt at hava farleiðina á Strandargøtuni so ovarlaga sum tilber.

Hitt bláa aktivið, stóru áirnar, eisini tikið við í uppskotið. Ofta verða áirnar í føroyskum bygdum og býum goymdar burtur. Hetta er stórt spell og eigur at vera vent til jalig blá aktiv sum økja um ansin fyri náttúruni og betrar trivnaðin.

# FUNKTIÓNIR AV BYGNINGUM




Bygningar, ið ikki verða nevndir her, hava sama snið og funktión sum verandi, altso eingin broyting.

13. Brandstøðin varðveitir funktión, men bygningur eigur at fáa ábøtur.

14. Lonin varðveitir funktión, men bygningur eigur at fáa nýggjan ham.

15. Ábøtur skal gerast við bygning. Funktión kundi verið flutt aðrastaðni. Tilhoyrandi garður eigur at vera latin upp fyri almenninginum, so hann gerst partur av grøna geiranum.

16. Viðmælt verður at Mortanshús verður knýtt saman við nýggja ætlaða bygninginum á Oyruni, t.d. kundi bygningurin verið bygdasavn.

17. Haraldsen burdi fingið eina hædd á aftrat til íbúðir, smávinnu ella felagskontór. Matvøruhandil skal framvegis verða á niðastu hædd.

18. Gamla dansistovan skal latast í nýggjan ham, helst við einari hædd aftrat. Umráðandi at útvent virksemi er á niðastu hæddini - kann t.d. framvegis verða pitsaria.

19. Turkihúsið hevur søguligt virði og eigur at verða varðveitt. Tó treingir bygningurin til ábøtur og hevði klætt at fingið nýggjan klædning og størri vindeygu. Niðasta hæddin skal takast í brúk til t.d. gallarí.

20. Viðmælt verður at byggja bókasavnið á Bug út og inn í Miðstaðarlundina, sí s. 31.

21. Bygningurin við Vørðsluni, Noðastovu vm. skal varðveitast, men viðmælt verður at gera ábøtur á hann. Niðasta hæddin skal takast í brúk við útvendum virksemi, t.d. atelier ella ungdómshús.

22. Stóri bygningurin har Muntra heldur til, er ikki broyttur í hesum uppskoti. Tó kann væntast at hann verður umvældur, bjálvaður og harvið fær nýggjar framsíður. Tá eigur at vera so í bandi at hann onkursvegna varðveitir byggistíl og -eyðkenni. Mælt verður greitt til at virksemi á niðastu hædd verður útvent og tiltalandi fyri fólk sum síggja inn á hæddina. Eisini funktiónin átti at verið virksemi sum vendir sær til virksemi sum gagnar borgarunum, býarlívinum og virkseminum frá morgni til út á kvøldið.

24. Tá virksemi við KJ Hydraulik steðgar, kann bygningurin gerast um til annað útvent virksemi, t.d. matstova. tó skal umbyggingin gerast við virðing fyri arkitekturinum og tí siðsøguliga.

27. Bygningurin skal framvegis verða matvøruhandil og hava kappróðrarneyst í niðaru hæddini. Mælt verður til at lata fasaduna á kappróðrarneystinum upp fyri at skapa lív. Aftrat neystinum er hugsað at hava bilsavn í eystara endanum. Møguligt er eisini at byggja eina hædd uppá bygningin aftrat við íbúðum. Hendan nýggja hæddin kann vera bert á einum parti av verandi bygningi.

30. Arbeiðsmannafelagsbygningurin treingir til at fáa nýggjan ham, og í sama viðfangi eigur bygningurin at fáa nýggjar funktiónir. Møguligt er framvegis at arbeiðsmannafelagið hevur ein part av bygninginum, men annars er pláss fyri tveimum íbúðum á ovastu hædd, smávinnu og/ella kontór á niðaru hæddunum.

33. 4 ungdómsíbúðir við felagshølum á niðaru hædd. Verður greitt frá seinni í heftinum.

34. Nýggjur bygningur við fornminni á niðastu hædd, møguleika fyri sølu og uppihaldi á miðhædd, sí s. 30.

35. 4 ungdómsíbúðir við felagshølum á niðaru hædd. Verður greitt frá seinni í heftinum.

36. 8 íbúðir í tveimum hæddum við kafé á niðastu hæddini. Verður greitt frá seinni í heftinum.

37. 4 íbúðir í tveimum hæddum við verkstaði á niðastu hæddini. Verður greitt frá seinni í heftinum.

38. Nýtt bátasavn, har pláss m.a. verður til bátarnar, ið standa í kjallaranum í Ribarhús. Bygningurin hevur siðsøguligar tilsipingar við neystamotivi á takskapi og neystahurðar, ið kunnu latast upp, tá gott veður er. Møguliga er pláss fyri øðrum funktiónum eisini, eitt nú bygdasavni ella gallarí.

39. 6 íbúðir í tveimum hæddum við kafé/pop-up virksemi á niðastu hædd. Verður greitt frá seinni í heftinum.

40. 4 íbúðir í tveimum hæddum við handilshølum á niðastu hædd. Verður greitt frá seinni í heftinum.

41. 6 íbúðir í tveimum hæddum við kafé/kontór á niðastu hædd. Verður greitt frá seinni í heftinum.

42.-43. 12 íbúðir í trimum hæddum. Verður greitt frá seinni í heftinum.

# SJÓVARMÁLI, STØDDARLUTFALL OG LANDSLAG



**SKRÁI**
Meginreglan fyri at skipað bygging framvið bakkanum, móti fjørðuni / sandinum, er at seta bygningar so í skráan, at niðasta hædd (kjallarahæddin) fær sín egna samleika og funktión í arkitekturinum. Kommunan kann í síni tillaging av byggisamtykt at áseta og loyva ymsum virksemi sum er best fyri flest møgulig fólk.

Í millum bygningar er eins týdningarmikið at skipa og áseta leiðreglur fyri tí kann og skal byggjast og gerast. Í miðbýnum er alneyðugt at geirarnir, ávikavist blái og grøni verða førdir oman skráan og sannførandi oman til sjóvarmálan.



**SANDURIN**
Smá hús, ið venda sama veg, sum onnur neyst.



**MIÐØKIÐ**
Hæddarmunurin frá vegi til sjóvarmála gevur møguleika fyri at skapa smærri háslættar og sosialar lummar millum húsini. Hús venda oman og niðan sum onnur hús við upprunaliga sjóvarmálan.



**HAVNAØKIÐ**
Bygningarnir hava ymiskar hæddir fyri at skapa góð millumøkir og binda havnaøkið saman við høvuðsgøtuni.

**STØDDARLUTFALL**
Atlit mugu takast fyri at støddarlutfall millum verandi og komandi bygningar er væl sett hvørt eftir øðrum so tað nýggja ikki ger seg inn á bygging og arkitektur í býnum. Í staðin fyri at byggja lægri og samanhangandi framvið sjóvarmálanum, verður mælt til at hava op ímillum nýggju bygningarnar og hava dirvi til at byggja hóskandi høgt, so sum mest fæst burturúr íløguni og volumuni / vavinum.




Prinsippskurður, ið vísur lutfalli og brúk av skráa.


KAFE

# STRANDARGØTAN



Týdningarmesta nýggja átakið í uppskotinum er Strandargøtan. Hon er fyrst og fremst ætlað til bleyta ferðslu; fólk til gongu, á súkklu, við barnavogni o.l. Lendi og lendismunir á staðnum gera tað vælegna at leggja slætta farleið fram við fjørðinum.

Fyri tað mesta er Strandargøtan gjørd úr betong, við bustaðari / kustaðari yvirflatu so tað er trygt at ganga, eisini í vátum veðri og hálku. Í serligum stykkjum har tað, sum er undir gøtuni, hevur týdning at síggja niður á ella hoyra alduskvatl, er farleiðin sum brúgv, úr timbri og / ella stál (corten).

Fleiri upplivingar er á leiðini sum bæði kunnu vera ferðamið í sær sjálvum ella tilhaldsstøð á leiðini. Útsýnispallur, benkur, trin oman móti sjónum, lítlar brýr o.a. Strandargøtan hevur sum fremsta endamál at knýta ymsu økini saman. Summu finnast longu ídag, meðan onnur er við hesum uppskoti nýggj í býnum.

Týdningarmikið er at bera so í bandi, at øll, bæði borgarar, eigarar av bygningum og møgulig handils- og vinnurekandi eru samd í valdum loysnum. Harumframt má góðskan á gøtuni vera góð, tí um tað bygda forferst skjótt og krevur nógv viðlíkahald, gerst úrslitið av átakinum hareftir.



Skreytmynd av Strandargøtu sum gongu- og súkklufarleið við beðum og sitiplássum.



Skreytmynd av Strandargøtu við atløguplássi og møguleika fyri havsvimjing.



Skreytmynd av Strandargøtu við útsýnis og uppihaldsøki.



Skreytmynd av Strandargøtu við niðurtrapping til sjógv og uppihaldsøkjum.



Tilsipingar til strandargøtu - promenada



Tilfarsval byggir á verandi tilfar í Fuglafirði

# BLÁI GEIRIN - FISKATORGIÐ



Sokallaði blái geirin er eitt øki oman og niðan í býnum, sum tekur støði í verandi fyribrigdum og viðurskiftum; men styrkir og byggir víðari uppá tey. Evnið í hesum geira, er fyrst og fremst frumevni vatn, eftirsum at Skarðsá liggur har hon ger og rennur oman gjøgnum bygdalagið, eins hon gjørdi áðrenn nakað var bygt á hesum stað.

Skarðsá er sum so, ein stór á; men tá hon kemur oman móti miðbýnum fer hon sundur í tvey. Størri parturin er enn sjónligur, meðan tann minni parturin er so at siga heilt burtur í dag. Skotið verður upp, at fáa báðar greinar av ánni sjónligar aftur. Endamálið er at skapa eina "oyggj" í tí bláa geiranum. Ikki bert skal áin latast meiri upp aftur; men eisini er týdningarmikið at áarbakkarnir vera gjørdur við størsta nærlagni so tað bæði gerst trygt, tiltalandi og vakurt fyri øll.

**SØGULIGT**
Verður hugt aftur í tíðina, sæst týdningurin av fyritakseminum hjá S.P. Petersen heilt týðiliga. Í dag sæst einamest Ribarhús. Í hesum bygningi er ymiskt virksemið sum tænir býnum almikið. Serliga á miðhæddini er nógv virksemi. Á loftinum er eisini nakað av virksemi. Niðasta hædd er í dag, nakað óvirkin. Men tað er stórt potentiali um økið frammanfyri, móti sjónum, verður gjørt virkið aftur. Uppskotið leggur upp til at niðast hædd og alt húsið, fær munandi betur samband við sjógvin aftur. Virksemið byrjaði jú við at fiskur kom uppá land á Piddasa kai og fluttur niðan í húsið og annars virkaður og turkaður á fiskastykkjum. Serliga beint omanfyri vegin á stórum fiskastykki sum rakk langt niðan. Stórur partur av fiskastykkinum er at finna enn, hóast steinarnir ikki síggjast í dag.

**FISKATORGIÐ**
Niðasti parturin av Bláa geiranum kann setast í navnið á góðari fiskavirking. Serliga niðanfyri Ribarhús, á tí sum í hesum uppskotinum verður kallað *Fiskatorgið*. Tað kundi eisini fingið navnið Petersenstorgið ella Petersensbryggjan. Keiin skal tó framvegis eita Piddasakaj.

Goymslubygningurin verður tikin niður og økið verður hampað og skipað nakað øðrvísi enn í dag; men fer at líkjast tí sum var fyri eini 80-100 árum síðan. Tó er tað komið afturat at farleiðin, *Strandargøtan*, kemur gjøgnum økið. Hetta vil skapa lív og virksemið og tí ræður tað um at geva fólki bestu karmar fyri tilhaldi og trivnaði. Eisini er týdningarmikið at gera tað møguligt at akfør kunnu koma við vørum til og frá og neyðsynjarakfør skulu sjálvsagt eisini kunna sleppa til.

**GAMLI SVIMJIHYLURIN**
Gamli svimjihylurin verður ikki broyttur; men mælt verður til at hann verður hampaður og gjørdur væl betri sum eitt mentanar- og søguligt stað sum lokkar fólk til ens. Blái geirin byrjar niðri við Piddasa kaj og endar við gamla svimjihyli.

**SPÆLIPLÁSS OG FISKASTYKKI**
Spælipláss og fiskastykkið er týðandi partur av bláa geiranum, men verður umrøddur serskilt aðrari síðu.

**FARLEIÐ TIL HELLURNAR**
Nýggja farleiðin niðan gjøgnum bláa geiran er eisini upplagdur partur av leiðini niðan á Skarð og til Hellurnar. Soleiðis kann ferðavinnan eisini fáa gleði av bláa geiranum.




Partur av bláa geiranum - Fiskatorgið 1:500



# GRØNI GEIRIN



Tá býir verða gjørdir betri, tillagaðir og útbygdir, verða oftast optimering og tætting av bygningum o.l. uppraðfest. Tað er sjálvsagt eisini neyðugt fyri at røkka endamálinum við at optimera og økja mongdina av bygningaøki og -fermetrum. Hinvegin er vorðið meiri greitt fyri øllum sum fáast við býarmenning og ávirkanir og árin av urbaniteti, at tað kann ganga útyvir trivnaðin hjá menninskjum í býum. Hóast Fuglafjørður nú og í mong ár framyvir hevur høg, grøn fjøll við líðum sum koma oman til bygt øki, má ansast eftir ikki at byggja náttúruna úti. Nógvar kanningar seinastu árini vísa at tað hevur sera stóran týdning, at fólk sum búgva í býarumhvørvi, eisini á stødd við Fuglafjørð, hava fyri neyðini, høggliga og ómakaleyst, at koma í náttúru. Og tá verður hugsað bæði uppruna og mannaskipaða og -skapta náttúru. Tí verður skotið upp, at styrkja og økja um náttúru og grøn øki í býnum. Miðstaðarlundin er longu nú eitt kærkomið øki til tílíkt tilhald. Hetta uppskotið betrar og leingir um tann grøna geiran so at hann spennir heilt frá sjóvarmálanum, gjøgnum miðstaðarlundina, økið runt kirkjuna og niðan til minnisvarðan, ovast í kirkjugarðinum.

Tað merkir, at miðstaðarlundin verður tillagað nakað, okkurt lítið øki verður skipað ørvísi og gróðursett Økið runt kirkjuna verður tillagað lutfalsliga meiri og «steinsett» við øðrum og grønari tilfari enn asfalti ídag og runnar og trø verða gróðursett. Grøni geirin heldur fram niðan móti og inn í kirkjugarðin. Í Fuglafirði er kirkjugarðurin eitt stórt økið sum hevur stórt potensiali til at verða ein tiltalandi lund. Alt má gerast við størstu virðing fyri gravum, gravsteinum, minnisplátum og minnisvarða. Havandi í huga at Fuglafjørður helst fer at vaksa nógv komandi 100 árini, er alneyðugt at gera eitt týðiligt grønt øki, sum bindur býarøkir saman og sum fær fólk at velja grønar leiðir oman og niðan gjøgnum býin. Samstundis sum fólk ganga frá einum stað til annað, fáa tey sansaligar upplivingar á vegnum sum stimbra sinnið. Uttan at hugsa um tað, fær hetta tey eisini at gleðast kropsliga og økist heilsan og trivnaðin hjá borgarum.




Partur av grøna geiranum - økið kring kirkjuna og kirkjugarðin 1:500

# LARSENSTORGIÐ



Tað stóra nýggja býarkenda átakið, er tað sum í uppskotinum hevur fingið navnið Larsenstorg. Navnið er til heiðurs fyri Petur Larsen, sála, sum bygdi virksemið upp í Baader og PL. Tó er hetta navnið bert eitt uppskot og kann torgið tí fáa annað navn seinni.

Hetta staðið í býnum liggur sera væl viðvíkjandi sólargangi. Sólin stendur á frá fyrrapartinum, heilt til seint á kvøldi. Bygningarnir standa eitt sindur spreitt í økinum. Dentur er lagdur á ikki at hava ov stórar samanhangandi bygningskroppar. Týdningarmikið er, at visuell sambond eru frá høvuðsvegnum oman til torgið, millum bygningarnar og víðari út á sjógv. Bygningarnir geva eitt livandi og varierað spæl í bygdalagnum. Í øllum skalum, tí stóra skalanum við samspæli við bygningum í bygdini, miðskalanum við tillaging millum bygningar, eldri og nýggjar, og í tí lítla skalanum, viðvíkjandi sansunum hjá menniskjanum, er týdningamikið at gera sær ómak við støddum og dimensionering. Harafturat er týdningarmikið, at niðasta hædd ikki er afturlatin fyri borgarar og vitjandi í býnum.

Hesin nýggi, lítli býarparturin í Fuglafirði, fer at økja um menniskaligu virðini í miðbýnum, soleiðis at skilja, at fólk fara at ynskja at søkja framvið sjóvarmálanum til økið og vera í økinum um rætt verður atborið. Við tryggari og áhugaverdari farleið, við ymiskum upplivingum og við t.d. kafé og handlum á niðastu hædd, eru góðar fortreytir tilstaðar fyri trivnaði. Eisini fer eftirspurningurin eftir íbúðunum í hesum økinum, at vera stórur, sjálvsagt treytað av at leigan ella keypsprísurin verður rímiligur.




Larsenstorgið 1:500



# GAMLA FISKASTYKKIÐ



Skotið verður upp at gera økið frá har Skarðsá fer í tvíningar og oman móti parkeringsøkinum omanfyri Muntra-bygninginum, til eitt alment økið til tilhald og spæl. Spælipláss á ovara partinum og ístandsett fiskapláss og gøtur o.a. í niðara partinum. Spæliplássið við funktiónum og spælieindum sum eru egnað til meiri enn ein aldursbólk, skulu vera av høgari góðsku. Harumframt skal alt skipast og gerast so at tað er serstakt tema sum ger júst hetta spælipláss til nakað serligt. Og serligt í landinum, ja møguliga altjóða eisini. Temaið er vatn, sjógvur, fiskur og fiskivinna. Alt skal gerast við einum farra av skemtifrásøgn verða gjørt listarliga.

Fiskaplássið er enn livandi í minninum hjá eldri fuglfirðingum og er ofta nevnt í samband við átøk sum kundu verið gjørd í býnum. Hetta serliga fyribrigdi í Føroya søgu, hevði eisini stóran týdning í Fuglafjarðar søgu. Tí er rætt at seta ein part av tí í stand og vísa tað serliga handverkið sum serstaka steinsetingin og grótarbeiðið var. Tó skal havast í huga at fyri at eitt tílíkt átak skal eisini geva meining fyri kommununa, býin og borgararnar. Um ikki fiskastykkið onkursvegna verður brúkt, antin mentanarliga, nýtsluliga ella sum eitt heilt serligt instalatión, skal átakið avmarkast. So at skilja at helst er rættast at seta ein part av tí í stand, so tað gerst eitt virðiligt umboð í samspæli við onnur átøk í økinum. Virksemið og handilin hjá S.P. Petersen, hevur havt sín stóra og virkna leiklut í at Fuglafjørður vaks og menti seg so nógv fyrst í farnu øld. Fólk fluttu til bygdina, bygdu sær hús og fingu familju. Klipfiskavirksemið hevur havt sera stóran týdning fyri allar Føroyar og fleiri støð í landinum hava tikið hetta serliga fyribrigdi í søgu okkar fram aftur í ljósmála. Hóast laksurin fyri tíðina er ímyndin av tí sunnu, góðu føroysku og norðurlendsku fiskvøruni, er toskurin, antin saltaður, turkaður ella feskur, eitt heilt serligt tilfeingi sum vónandi aftur verður týðandi føðsluvøra.









Tilsipingar til sergjørd spælipláss við havtema, dømi frá Kompan og Monstrum




Hondteknaður skurður av fiskastykkistorginum og uppihaldstrappu móti Skarðsá.



Vippandi træflakar, sum spælieind, ið er ein tilsiping til fiskastykkisgrót





Tilsiping til gummiálegging sum undirlag á spæliplássinum, ið leiðir tankarnar til sjógvin





Álegging við fiskastykkisgróti (møguligt við ífyllu av øðrum). Økið verður brúkt til uppihald.




Partur av bláa kílanum - Gamla fiskastykkið 1:500

# HØVUÐSVEGURIN



Skotið verður upp at tálma ferðsluni, serliga tí sokallaðu tungu ferðsluni gjøgnum býin. Í stuttum kann sigast at borgararnir eiga býin, ikki lastbilar og trailarar. Tunga ferðslan fer framvegis at sleppa at koyra gjøgnum býin. Men nýggja átakið er at við álegging, uppraðfesting av bleytari ferðslu og fólki til gongu, vil vegastrekkið í miðbýnum kennast nógv tryggari og betri. Harafturat fer tað at kennast meiri sum eitt álagt øki sum er gjørt einamest til fólk. Tað fer eisini at síggja snøggari út enn stóru asfaltflaturnar vit kenna ídag. Arbeitt er við ymsum løgum av álegging og mynstrum sum ger at bilførarar vera gjørdir varðugir við, at nú er komið til eitt annað økið, sum ikki er vegur. Ikki vegur eina; men eitt serligt øki ella strekki, har onnur enn bilar eru. Bilførarar fara eisini at merkja tað á akfarinum at best er at seta ferðina niður.

Estetiskt og fagurfrøðiliga fer vegurin í miðbýnum at taka seg heilt øðrvísi út enn í dag. Áhugaverd mynstur í ymsum steinum og flísum, fara at gera sítt til at fólk, antin tey eru til gongu ella støðga á í økinum, merkja eina vælveru og at her eru tey vælkomin. Tvørtur um vegin, leiða mynstur og tilfar eisini fólk frá bláa- og grøna geiranum og oman til farleiðina fram við sjóvarmálanum. (Tílík handfaring av ferðslu mótvegis fólki til gongu, er framt í Vágsbotni í Havn við góðum úrsliti.)

Sjálvsagt skal tílíkt skipast og gerast við størsta umhugsni og nærlagni. Greitt er at stensetingin skal tola stórt trýst og ávirkan frá akførum. Eisini eftir nógv ára ferðslu skal tilfarið, kantar og mynstur standa sterkt.




Dømi um flatmynd av høvuðsvegi 1:100



Tilsipingar til shared space



Tilsipingar til tilfar - basaltbrúgvasteinar, betongbordursteinar og linjudren úr corten




Dømi um skurð av høvuðsvegi 1:100



# HAVSVIMJING OG KYRJASTEINUR



Skotið veður upp at gera eitt serligt øki til ymiskt virksemi sum vendir sær til sjófrítíðarvirksemi. Økið er lagt uttarliga á grótkast-arminum, uttanfyri Kyrjastein. Henda staðseting er vald av fleiri orsøkum. Góðir parkeringsmøguleikar eru, sólargangurin er góður, serliga seinnapartar og út á kvøldið. Hetta hevur rættiliga stóran týdning, góðu dagarnar í summarhálvuni. Harafturat verður visuelt samband millum sandin og tað sum bygt varður uttanfyri so svimjast kann inn á sand og útaftur. Ella tá róð verður við gummibátum og kajakkum, at eisini tey smæstu kunnu byrja trygt.

Tað nýggja bygda annleggið má eisini vera lagað so, at tað lívir fyri súði og bylgjum. Tí er uppskotið meiri eitt dømi enn eitt endaligt uppskot til snið og funktiónir. Miðast skal eftir eisini at skapa eitt heilt trygt sand- / strondumhvørvið innanfyri sjóannleggið.

Fyri at tílík átøk / virksemi kann virka, er alneyðugt at gera nakrar einfaldar og smærri bygningar, fyri at hýsa neyðugum hentleikum. Góðar umstøður mugu vera til skifting, brúsur, wc, hitarúm, kaffikrók, møguligt felagsrúm, goymslur o.l.

Í uppskotinum er Kyrjasteinur ikki tikin burtur. Mælt verður kommununi til at taka tøk og seta í verk miðvíst átak at gera eitthvørt við Kyrjastein. Sum hann stendur nú, er estetiska virðið lágt, hóast søguliga virðið er sjónligt tilstaðar, hóast øll síggja at nakað er eftir á mál. Staðsetingin er eisini ílagi. Men týdningarmikið er at tora at fremja onkra tillaging. Eitt uppskot er at lata skipið verða sum tað er og byggja útsýnis-/framførslupall omaná. Onnur átøk kunnu eisini gerast.



Skreytmynd av Kyrjasteini við nýggjum timburdekki









Tilsipingar til havsvimjing "havnebad"



Uppskot, gjørd við vitlíki, til nýhugsan av Kyrjasteini





Tilsipingar til gøtulist á eldri báti




Havsvimjing og Kyrjasteinur 1:500

# VÍKINGATOFTIR - OYRAN



**OYRAN - GJÓGVARÁ**
Økið við Oyruna og niðri við Gjógvará fer at verða broytt til at verða eitt savningarøki sum kann savna nógv fólk og ymiskar áhugabólkar til ymisk endamál.

Fyri framtíðna er týdningarmikið, at kommunan ber so í bandi, at Gjógvará og hvussu hon rennur í hav, við ósan, verður gjørt tilvitað og við virðing fyri náttúrfyribrigdinum, sum ein stór á er. Ósin í sær sjálvum savnar fólk, bæði til eygleiðing, spæl og t.d. fisking.

**NÝGGJUR BYGNINGUR**
Nýggja átakið er ein bygging sum hevur ymsar funktiónir og sum kemur at vera eitt fokuspunkt og savnandi fyri økið.

Hesin einfaldi bygningurin ella paviliongin, eftirsum at bert ein partur er hugsaður sum bjálvað og hitað, hevur í minsta lagi 3 funktiónir.

1. Niðasta hædd hevur til endamáls at verja og sýna fram víkingatoftirnar. Tað er sjálvsagt, at toftirnar eiga at vera grivnar fram í samstarvi við serkunnleika. Fuglafjørður hevur nógv at vinna við at tjúkla um søguna um víkingagarðin við Gjógvará. Henda ríka søga og mentan passar væl til hvussu býurin er og hvussu hann kundi ment seg.

   Toftirnar liggja so mikið lágt í verandi lendi, at tær koma at vera í niðastu ella kjallarahæddini. Hetta er ein kærkomið máti at byggja upp tvær hæddir ávikavist lágt niðri móti ánni vestureftir og hægri eystureftir móti Oyruni og móti neystinum har fólk savnast.

   Visuelt samband eigur at vera úr hesi hædd bæði út á sjógv og móti ánni og ósanum. Dekkið í nýggja bygninginum passar væl til lendishæddina á Oyruni suður-eystureftir. Tí verður mælt til at skipa hann so at ein stórum pallur ella gólvflata, við taki yvir. Bæði fyri at hýsa t.d. røðarum, lítlum orkestri og eisini kunnu eini 50-100 fólk leita sær skjól um veðrið er illfýsi. Uttanfyri kunnu nógv savnast har eisini ljós og streymur lagdur til.

   Soleiðis kunnu ferðafólk vitja víkingagrundina á niðara hædd og annars njóta savningarøkið ovarhædd.

   Nýggja pavilliongin við Gjógvará sameinirnar ánna við víkingatoftina sum savningarøki soleiðis at tað kann vera konsertir, røður og annað á ovaruhædd sum vendi sær vestureftir. Á vestaru síðu ber til at sita upp á uppi á pavilliongini og hyggja niður móti ánni og møguligt er at fara niðurundir til toftirnar.

2. Skotið verður upp at hava eitt bjálvað og hitað øki, sum kann nýtast til kunning - lítið visitorsentur við minni kaffistovu. Skotið verður eisini upp at hava fokus á at bjóða dygdarvørur summarhálvuna og til serstøk tiltøk. Vørur sum t.d. gott kaffi, serliga góðar ísar o.a. líknandi. Er veðrið gott ein summardag hevði tað økt um trivnaði bæði fyri vaksin og børn um til bar at keypa sær góðan ís. Hetta vildi eisini økt um áhugan at gingið ein túr frá miðbýnum eftir strandargøtuni til ís-kaféina.

3. Ovasta hæddin (loftið) kann nýtast til goymslu ella annað. Hetta veldst um hvussu skapið á takinum verður.

**BRÚGV**
Fyri at binda *Strandargøtuna* við økið Úti á land, er neyðugt við eini brúgv sum kann geva fólki trygt høvi at sleppa tvørturum Gjógvará niðri við sjóvarmálan. Brúgvin skal verða so lítil og smøl sum forsvarligt og ikki taka meiri uppmerksemi enn neyðugt. Men hinvegin skal hon vera tiltalandi og fella nattúrligt saman við farleiðini, ánni og sandinum.



Hondskitsa av opnum bygningi yvir víkingatoftunum


Hondteknaður skurður gjøgnum bygningin



Tilsipingar til opna bygningin

# BÓKASAVN



Í útbjóðingartifarinum stendur, at bókasavnið sum nú húsast í gomlum bygningi, verður eftir ætlan útbygt. Í hesari miðbýarætlanini er stór útbygging, sum verður nakað serlig og sermerkt. Av tí at flestu bøkur og virksemi so sum fyrilestrar og framsýningar ikki hava tað stóra dagsljósið fyri neyðini, er bókaparturin lagdur inn í lendið. Við at skipa byggingina soleiðis, ávirkast miðstaðarlundin lítið og kann fáa gagn av útbyggingini. Synergi kann fáast burturúr báðum økjunum.
Hóast útbyggingin er løgd í lendið, vil stóra glaspartíið, sum vendir oman móti høvuðsvegnum í býnum, tíðliga gera vart við seg, draga at sær og bjóða áhugaðum inn. Flestu bókasøvn vera í dag brúkt sum mediasøvn og tað krevur pláss og hentleikar. Tí kemur vavið at vera lutfalsliga stórt; men økið rúmar tí.







# BRÚGV



Sum eitt eyka hugfarsligt átak í tí maritima økinum í miðbýnum, kundi ein serlig brúgv verið. Hon vildi givið fólkið møguleikan at gingið sær ein túr út eftir verandi ytra armi av bátahylinum, út á endan og sum tað nýggja, at farið tvørturum brúnna og yvir á Larsenstorg. Haðanífrá kann ein so ganga runt aftur. Við hesum ber til bæði at ganga framvið sjóvarmálanum og at ganga runt bátahylin.

Brúgvin kann sniðgevast á ymsan hátt; men fyrst má takast støða til um hon skal vera føst ella sum ein sum letur seg upp fyri bátum við høgu mastrum. Skitsa vísur eina sum útgangspunkt altíð er opin og fer bert niður tá fólk trýsta á knøtt fyri at sleppa tvørturum.

Týdningarmikið er, at brúgvin, bæði tá hon er uppi og niðri, er ein skulpturur í býnum sum er spennandi, hugtakandi og vakur. Í myrkri kundi hon verið ljóssett tiltalandi. Hugsast kann, at vinnuvirki í býnum kundu verið við til at stuðla / ment / bygt brúnna.



Hondskitsa av opnu brúnni - vanlig støða



Hondskitsa av afturlatnu brúnni

# ARKITEKTURUR

**ARKITEKTONISKT ÚTTRYKK**
Arkitekturin leggur dent á bygningseindir við hóskandi støddum, hæddum og breiddum, so góðar íbúðir kunnu fáast burturúr. Miðað er eftir at finna tráðin og eyðkennið í bygginini í býnum og tolka tað í nýggjum skapum. 2-3 hæddir, síðbundna møn, men eisini asymmetriskt takskap.

Niðasta hædd (veghædd) er sniðgivin so at hon brýtur frá ovaru hæddunum. Hetta er partvíst fyri at leggja betri uppat byggistílinum í verandi grannabygningum, har ein grund (kjallari) er. Og partvíst tí at virksemi á veghædd verður ætlandi útvent virksemi, sum tí er annar arkitekturur, dimensionering og tilfar.

Dagsljósið fer at vera serligt her í økinum, av tí at seinnapartssólin fer at skyggja í sjónum. Hugtakandi ljósspæl fer at vera t.d. uppi undir loftinum í íbúðunum. Hetta er ein fyrimunur tá íbúðir eru lutfalsliga djúpar. Tó eru íbúðir lagdar ymsar vegir í bygningunum fyri at geva størri fleksibilitet og møguleika til altanir á fleiri síðum. Altanir eru í høvuðsheitum inni í bygningsskapinum so heildin verður hóvligari. Harafturat verða altanirnar betri vardar fyri vindi og regni.

Parkering er ein partur av bústaðarøki og parkeringflaturnar eru lagdar í hóskandi støddum við einstøku bygningarnar. Mælt verður til, ikki at hava parkeringsflatur ov stórar í øki sum hesum. Eisini verður mælt til at fara væl um parkeringsøki, gera tey snøgg og at gera tey heilt liðug so hvørt bygningar verða bygdir.

**ARKITEKTURPOLITIKKUR**
Yvirskipað kann sigast, at Fuglafjørður eigur at orða ein arkitekturpolitik sum fevnir um allar skalar av bygging í býnum, eisini vinnu- og ídnaðarbygging. Ymisku økini, bústaðir, grøn økir, strandarøki / sjóvarmáli, vinna og frítíðarøkir eiga at vera skipaði greitt so at tey hvør í sínum lagi, hava sterk serkenni og góðar dygdir.

Býurin eigur at vaksa støðugt og skipað. Tíðin vísur tó, at ofta kemur vøkstur og øking av t.d. bygningum í herðindum. Hetta kann føra við sær, at stórar verkætlanir og bygningar kennast fremmandir og ikki so væl lagaðir til bygging annars í býnum. Hetta eigur verða skipað og stýrt sum frægast.

Tilfar, smálutir og litir á bygningum seta sín dám á býin og grannaløg. Tó skal ikki stýrast so, at bygningar líkjast ov nógv. Framsíður mugu geva ymiskleika og spæl í samlaðu myndini. Týdningarmikið er eisini at t.d. í / við bygningum við fleiri íbúðum, er pláss og økir til felagsskapin og til íbúgvarnar í býnum.

List er týdningarmikil og gevandi partur í tí bygdaumhvørvinum í Fuglafirði. Mælt verður til at fáa list, standmyndir, installatiónir o.a. í høgari góðsku um ætlanin er at verkini skulu standa langa tíð.

Neyðugt er eisini við dygdargóðum støðum, plássum, pallum o.t. í býnum, serliga við sjóvarmálan. Tílíkar íløgur loysa seg tá hugt verður nakað fram í tíð. Góður arkitekturpolitikkur sum viðførir góðan arkitektur er neyðugur fyri at Fuglafjørður skal standa seg í kappingini við aðrar býir, umframt at tað gevur betri lívskor hjá borgarunum.





Tilsipingar til nýggjar bygningar

# VIÐKOMANDI FASADUR (1:200)



# MÁLBÓLKAR OG BÚSTAÐARSLØG

Val av sløgum av bústøðum til miðbýarætlanina er gjørd út frá ynskjum í miðbýarætlanini um fjølbroyttar og fleksiblar bústaðir - ymiskar bústaðir til ymiskar málbólkar. Tey seks bústaðarsløgini, ið vera mett at vera viðkomandi at vísa, dekkar tørvin hjá ymiskum málbólkum. Niðanfyri er víst á seks ymiskar málbólkar og meting er gjørd fyri hvørt bústaðarslag, hvør málbólkur hóskar seg til hvørt slag. Íbúðirnar eru frá 60 til 105 m² umframt ungdómsíbúðir á 35 m² (bústaðarslag 6). Á bústaðarslagi 1-4 er niðasta hæddin til útvent virksemi, eitt nú handlar, kontór, verkstaðir ella felagshølir. Bústaðarslag 5 hevur íbúðireindir heilt niður á vegahædd, meðan ungdómsíbúðirnar (bústaðarslag 6) hevur felagshøli á niðastu hædd. Allar íbúðir hava egið depotrúm.

Fyri at skapa javnað, er umráðandi at nýggju bústaðirnir kunnu keypast ella leigast fyri ein rímiligan prís.

Tað verður ikki mett at tørvur er á einum hotelli til Fuglafjørð. Tað hevði kravt ein størri bygning við nógvum eindum fyri at fáa tað fíggjarliga at mala. Haraftrat krevur eitt hotell eitt hóskandi tal av starvsfólkum. Ferðavinnan er tó sera svingandi ímun til árstíðir, so tað er ikki so regluligt starv. Ístaðin verður viðmælt at ein ella fleiri av nýbygningunum kunnu verða hotellíbúðir. Her klára tey ferðandi í størri mun seg sjálvi og tørvurin á starvsfólki er minni. Um tørvurin broytist, so tað gerst tørvur á fleiri ella færri hotellíbúðum, er rímiliga lætt at gera hetta um.







## Bústaðarslag 1

6 íbúðir til málbólkin:



**1. HÆDD (1:200)**




**2. OG 3. HÆDD (1:200)**



# Bústaðarslag 2

4 íbúðir til málbólkin:



1. HÆDD (1:200)




2. OG 3. HÆDD (1:200)




# Bústaðarslag 3

6 íbúðir til málbólkin:



1. HÆDD (1:200)




2. OG 3. HÆDD (1:200)



# Bústaðarslag 4

12 íbúðir til málbólkin:



### 1.-3. HÆDD (1:200)




# Bústaðarslag 5

4 íbúðir til málbólkin:



### 1. HÆDD (1:200)




### 2. OG 3. HÆDD (1:200)




# Bústaðarslag 6

4 íbúðir til málbólkin:



### 1. HÆDD (1:200)




### 2. OG 3. HÆDD (1:200)



# Bústaðarslag 1




# Bústaðarslag 5




# Bústaðarslag 2




# Bústaðarslag 6



# FERÐSLURENSL

**BILA- OG TUNG FERÐSLA**
Tunga ferðsla verður framvegis leidd eftir høvuðsvegnum í Fuglafirði. Tó verða ferðslutálmandi átøk gjørd fyri at broyta hierarkiið og geva bleytu ferðsluni størri ans. Sí meira um hetta á s. 27. Endamálið við umskipanini er at skipa flaturnar við asfaltið øðrvísi og betri til onnur endamál til gagns fyri býin.

Skotið verður eisini upp at skipa ferðsluna í býnum nakað øðrvísi við at gera nakrar vegir einans til einvegis ferðslu. Harvið kemur minni trýst á høvuðsvegin og átakið leggur upp til at ferðast til gongu ella á súkklu oman á høvuðsgøtuna fyri íbúgvarnar í Fuglafirði.

Nógvastaðni verða gjørdir parkeringsbásar fram við vegnum og aðrastaðni verður verandi vegbreidd smalka ella broytt til grønar lummar ella eitt nú størri pláss og ymiskt annað, t.d. fram við Skarðsá.

Aðrar meiri víttfevnandi loysnir, við eitt nú at flyta farleiðina við tungari ferðslu, kundu verið skotnar upp; men tað letur seg neyvan fremja komandi heilt nógvu árini.

**BLEYT FERÐSLA**
Bleyta ferðslan - bæði fólk til gongu, á súkklu og fólk við rørslutarni - fær nógv betri fortreytir í hesum uppskotinum. Umframt ferðslutálmandi átøkini á høvuðsvegnum, er nýggja strandargøtan ætlað til fólk til bleytu ferðsluna. Her eru eisini týdningarmikil sambond millum høvuðsvegin og strandargøtuna. Eisini eru høvuðsgøturnar í bláa og grøna geiranum styrktar við greiðari sambondum og eyðkennum. Allar tríggjar høvuðsgøturnar eru trinleysar og egnaðar til súkklur, barnavognar og rørslutarnað fyri uttan gongutúrin á strondini, har víst verður á alternativa leið.

Framvið hesum høvuðsleiðum eru mong, fjølbroytt uppihaldsøkir. Møguleiki er fyri at sita og njóta góða útsýni og/ella verða saman í stórum ella smáum bólkum í sosialum samanhangum. Lagt er upp til rørslu og spæl í fleiri støðum.






# BURÐARDYGD

Hendan miðbýarætlan leggur dent á burðardyggar loysnir á fleiri ymiskum stigum. Arbeitt hevur verið útfrá útvaldu átøksøkjunum í býarmenningar-doughnuttinum (greitt frá á s.13).

Fyri at verja upprunalendi, vistskipanirnar á sjógvi og landi, er bert bygt á verandi lendi, sum so ella so longu er í brúk. Eisini er arbeitt við at fáa sum mest burturúr verandi bygningum og ikki taka burtur bygningar fyri at byggja nýtt. Tó so, eru nakrir tiknir burtur, tí fyrimunurin av teimum skapaðu útiøkjunum var mettur hægri. Dentur er lagdur á at varðveita lívfrøðiliga margfeldi við at byggja eftir lendi og harvið flyta minst møguligt at jørð. Haraftrat verður gjørt fleiri positiv átøk sum t.d. at gróðurseta nýggj trø og finna nýggj økir til planting. Fleiri parkeringspláss eru eisini blivin áløgd við grasarmering fyri at styrkja um samband millum grøn økir - fyrimunur fyri bæði menniskju og djór. Natúrliga frárensli av regni niðurgjøgnum grasarmeringsáleggingina er enn ein fyrimunur við hesum slagi av álegging.

Lagt er upp til at nýbyggingin er av høgari góðsku og heilsugóðir (bæði kropslig og sálarlig heilsa). Umráðandi er at byggja út frá tørvinum, ið er ella kann væntast. Sniðgávan er skal vera haldfør og fleksibul. Hvør eind skal ikki vera størri enn neyðugt og mest møguligt skal fáast burturúr hvørjum fermetri. Í næstu stigum er umráðandi at varðveita ringráshugsanina, so burðardygd verður eitt lyklaorð gjøgnum inntil bygningarnir standa lidnir. Øll nýbygging skal vera við orkurøttum konstruktiónum, natúrligari ventilation og við góðum dagsljósforholdum. Bústaðir við rímiligum prísi er við til at skapa javnað.

Við at øll nýbygging er nærhendis býarkjarnanum er lagt upp til burðardygga samferðslu, tí til ber at ganga, súkkla ella taka buss hjá øllum. Universelt design og atkoma fyri øll er eisini eitt aðalmál fyri hesa miðbýarætlanina.

Viðmælt verður at øll ný- og umbygging verður hita við burðardyggum orkukeldum, eitt nú sjóhita.




Skurður, ið vísur prinsippir fyri burðardygt til alla nýbygging

# 12 BÝARLÍVSMETINGARPUNKT

Góðar liviumstøður fyri íbúgvarnar í Fuglafirði er eitt aðalmál við hesari miðbýarætlanini. Mett verður at nærum øll 12 býarlívsmetingarpunktini koma uppá 100% um konseptið verður fylt og støðið verður tikið í hesari ætlan. Serliga verða tað skapað góðir møguleika at uppihalda sær, sita, ganga, íðka, spæla, uppliva góðu síðurnar av veðrinum, umframt at miðbýarætlanin gevur Fuglafirði høgar estetiskar dygdir og góðar sansaupplivingar. Eisini er støddarlutfallið eitt høvuðsátaksøkið fyri at skapa ein liviligan bý.

Óstøðuga føroyska veðrið er nærum ómøguligt at verja íbúgvarnar fyri heilt. Hetta er tí bert á 75%. Sama er við ferðslutrygdini. Hóast nógv átøk eru viðmæld, er tað ein sannroynd, at tunga ferðslan fer at koyra eftir høvuðsvegnum í nógv ár framyvir. Tungi ídnaðurin ger tað eisini trupult at uppnáa friðarligt umhvørvið í øllum býnum. At enda er at siga, at miðbýarætlanin gevur best møguligar fortreytir hjá allar bleytari ferðslu at flyta seg runt í Fuglafirði - eisini fyri rørslutarnað. Tó slepst ikki undan brøttum brekkum og trappum í støðum.



